# HAGTALSLÝSING

## 0 Alment

### 0.1 Heiti

Roknskaparhagtøl, vinnufyritøkur, vinnugreinabýtt

### 0.2 Evnis- / hagtalsøki

Vinnuhagtøl, roknskaparhagtøl

### 0.3 Ábyrgd

Hagtalsdeildin

### 0.4 Heimildir

Roknskapartilfarið er fingið til vega við heimild í lóg um Hagstovu Føroya. Talan er um upplýsingar um einstakar fyritøkur, og sambært ásetingunum í lóg um Hagstovu Føroya og innanhýsis reglugerðini fyri arbeiðið hjá stovninum, sum byggir á regluverkið hjá ST fyri hagtalsarbeiði, er grundtilfarið tískil ikki alment.

### 0.5 Ampi

Í allarflestu førum er talan um endurnýtslu av tilfari, sum fyritøkurnar longu hava latið skattavaldinum, so henda hagtalsframleiðsla hevur lagt nærum ongar eyka byrðar á fyritøkurnar.

## 1 Bakgrund og endamál

### 1.1 Endamál

Endamálið við roknskaparhagtølunum fyri vinnugreinir er at skapa grundarlag fyri at lýsa føroyskt vinnulív, geva grundarlag fyri rakstrargreiningum, vinnupolitiskum avgerðum og eftirmeting av førda vinnupolitikkinum. Roknskaparhagtølini eru eisini týðandi ískoyti í uppsetingini av tjóðar roknskapinum.

Hagstova Føroya gav í 2001 út ritið "Vinnugreinahagtøl 1985-1998". Framleiðslan av vinnuhagtølum er síðan broytt nakað og samanbering við uppgerðirnar í fyrru útgávuni kunnu tí ikki gerast uttan ávís fyrivarni.

### 1.2 Brúkarar

Fyritøkur, myndugleikar, politikarar, fjølmiðlafólk og lesandi v.m.

## 2 Innihald

### 2.1 Vavi

Uppgerðirnar fevna um virksemið hjá ikki-fíggjarligum feløgum árini 1998-2003, t.v.s. alt vinnuligt virksemi í Føroyum, tó undantikið virksemi, sum verður rikið innan karmarnar av einstaklinga fyritøkum og undantikið virksemið hjá fíggjarfyritøkum.

Tey feløg, sum eru við í uppgerðunum hava hesar virkishættir: Partafeløg, smápartafeløg, íognarfeløg, lutafeløg, kommanditfeløg, keypsamtøkur v.m.

### 2.2 Mát, støddir og hugtøk

Í roknskaparhagtølunum verða hesar konti brúktar, tað er vert at leggja til merkis at vit hava valt at vísa rakstrarúrslit, uttan úrslit av kapitalpørtum. Hetta er gjørt fyri ikki at rokna inntøkur frá dótturfeløgum við tvær ferðir. Tað eru ávísir veikleikar við hesum hátti, men tað má kortini metast at geva eina meira rættvísandi mynd, tá talan er um alla vinnuna samanlagt.

**RAKSTRARROKNSKAPUR INNTØKUR**

| | |
|---|---|
| Nettosøla: | Sølan er skrásett sum hon stendur í roknskapinum, hon fevnir um høvuðsvirksemi hjá fyritøkuni |
| Broyting í goymslu: | Er mest vanligt í fyritøkum har framleiðslutíðarskeiðið er longri enn eitt ár |
| Aðrar inntøkur: | Umfatar aðrar inntøkur enn tær sum hava við høvuðsvirksemi, hjá fyritøkunum at gera |
| Fíggjarinntøkur: | Rentur av innistandandi |
| Óvanligar inntøkur: | Vinningur í sambandi við sølu av materiellari støðisogn, annars aðrar eingangsinntøkur og í nøkrum førum eisini stuðul úr landskassanum. |

**ÚTREIÐSLUR**

| | |
|---|---|
| Aðrar rakstrarútreiðslur: | Allar aðrar vanligar rakstrarútreiðslur, enn starvsfólkakostnaður og avskrivingar |
| Starvsfólkakostnaður: | Lønargjaldingar, eftirlønir og arbeiðsmarknaðargjøld |
| Avskrivingar: | Vanligar avskrivingar |
| Fíggjarútreiðslur: | Rentur av lánum |
| Óvanligar útreiðslur: | Tap í sambandi við sølu av materiellari støðisogn, og aðrar eingangsútreiðslur |
| Úrslit av Kapitalpørtum: | Úrslit áðrenn skatt frá dótturfeløgum, inntøkur frá assosieraðum feløgum |
| Skattur av rakstrarúrslitið: | verður skrásett sum tað stendur í roknskapinum |
| Rakstraúrslit: | sum tað stendur í roknskapinum |
| Rakstrarúrslit uttan dótturfeløg | o.a. rakstrarúrslit sum omanfyri, frárokna úrslit av kapitalpørtum |

**FÍGGJARJAVNI OGN**

**STØÐISOGN**

| | |
|---|---|
| Immateriell støðisogn: | Rættindi, herundir veiðirættindi, licensir og good will |
| Materiell støðisogn: | Vanlig støðisogn so sum grundøki, bygningar og rakstrargøgn |
| Fíggjarlig støðisogn: | Kapitalpartar í dótturfeløgum, kunnu ávirkast av rakstrarúrslitum hjá dótturfeløgum |

**OGN Í UMFERÐ**

| | |
|---|---|
| Vørugoymsla: | Rávørur, hálvlidnar- og lidnar vørur |
| Áogn: | Áogn hjá viðskiftafólki, og aðrir kredittir |
| Tøkur peningur: | Gjaldføri, kann eisini verða virðisbrøv, um so er, at hesi av fyritøkuni verða mett sum tiltaksgjaldføri |

**SKYLDUR**

**EGINPENINGUR**

| | |
|---|---|
| Partapeningur: | Parta- ella smápartapeningur sum er settur í fyritøkuna, hjá serligum virkisháttum kann talan verða um innskotskapital. |
| Grunnar: | Tiltaksgrunnar, uppskrivingargrunnar og líknandi |
| Fluttur vinningur: | Umfatar ársúrslit hjá fyritøkuni samanlagt, frárokna vinningsbýti, tað sum lagt verður í tiltaksgrunnar, og reguleringar |
| AVSETINGAR: | kann t.d. verða tap, útsettur skattur ella líknandi, har gjaldsdagur ella upphæddin er ókend |

**SKULD**

| | |
|---|---|
| Langfreistað skuld: | Lán har gjaldsfreistin er longri enn eitt ár |
| Stuttfreistað skuld: | Skuld har gjaldsfreistin er styttri enn eitt ár |

**LYKLATØL**

| | |
|---|---|
| Tal av feløgum: | Tal av feløgum, sum sambært Toll & Skatt hava útgoldið løn í árinum |
| Starvsfólk (heiltíðarstørv): | Tal av ársverkum sambært ársroknskapin, skal takast við fyrivarni av tí at uppgerðarhættir eru ymiskir |
| Ognaravkast í %: | (Úrslit áðrenn fíggjarpostar)*100/(við ognir tilsamans) |
| Rakstraravkast í %: | (Úrslit áðrenn fíggjarpostar)*100/(nettosølu + broyting í goymslum og øðrum inntøkum) |
| Eginpeningsavkast í %: | (Úrslit eftir rentur men áðrenn kapitalpartar og skatt)*100/ (eginpening) |
| Trygdarevni í %: | (eginpeningur)/(ognir tilsamans) |
| Gjaldførisevni í %: | (ogn í umferð)/(stuttfreistaða skuld) |
| Roknskapardekingur í %: | (lønargjaldingar hjá fyritøkum har roknskapur er lagdur inn í skipanina) *100/(lønir hjá øllum fyritøkum) |

**VINNUBÓLKINGAR**

Vinnubólkingin sum verður brúkt kallast HG3vinnur[1] sum er ein bólking av føroysku vinnugreinaskránni FV93[2]. Í HG3vinnur eru umleið 60 vinnugreinir.

Í hagtølunum verða hesar høvuðsbólkingar av vinnuni brúktar:

| | |
|---|---|
| Tilfeingisvinnur: | Fevnir um landbúnað, fiskiveiðu, fiskaaling og ráevnisvinnu, í hesi uppgerðini tó ikki oljuvinnu. |
| Vøruframleiðsluvinnur: | Fevnir um ídnað, byggivinnu og orkuframleiðslu. |
| Tænastuvinnur: | Fevnir um allar privatar tænastuvinnur, herundir handil og umvælingar-virksemi, matstovu og gistingarhús, samferðslu og samskifti, og aðrar tænastuvinnur. |

## 2.3 Bólkingin av vinnugreinum

Føroyska vinnugreinaskipanin er sum kunnugt FV93, hon er sprotin úr donsku DB93, sum hevur sín uppruna í altjóða skipanunum hjá ES og ST sum eru NACE og ISIC.

Føroyska FV93 hevur 6 siffur og er skipa úr erva, høvuðsbólkar í FV93 fáast við at bólka eftir fyrsta siffur í skipanini. Fínari vinnubólkingar fáast við at annað siffur, triðja siffur o.s.fr. Í fínastu bólkingini í FV93 eru 836 vinnugreinir, í Føroyum er virksemi í umleið helvtini av teimum.

Tey fyrstu 4 siffruni í FV93 eru tey somu sum í teimum altjóða skipanunum, hetta hevur tann fyrimun at samanberingar millum lond, kunnu gerast.

Av tí at føroyskt vinnulív er einstáttað, er neyðugt tá ið føroyskt vinnulív verður lýst, at gera eina serliga bólking. Tað er ikki møguligt at leggja seg á eitt ávíst FV93 siffur, t.d. triðja siffur, ístaðin má ein blandað bólking nýtast. T.v.s. at í onkrum vinnubólki, t.d. feskfiskaveiðuni verða øll 6 siffur brúkt, og í øðrum vinnubólkur, t.d. byggivinnuni, verða 2 siffur brúkt, sum er ein grovari bólking.

---

[1] HG3vinnur, stendur fyri 3. vinnubólkin hjá Hagstovuni

[2] FV93 stendur fyri Føroysk vinnugreinaskrá 93, hetta er føroyska útgávan av altjóða standardunum fyri vinnugreinaflokking NACE. Flokkingin er at finna á: www.hagstova.fo

Bólkingin av føroyskum vinnulívi í hesi útgávu er henda:

| FV93 | | Høvuðsbólkar | | FV93 nr. | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | frá | til | frá | til |
| **2.4** | **Tilfeingisvinnur** | **01** | **14** | | |
| Landbúnaður | | 01 | 02 | | |
| Feskfiskaveiða | | 05 | 05 | 05.01.10 | 05.01.10 |
| Onnur fiskiveiða | | 05 | 05 | 05.01.15 | 05.01.70 |
| Fiskaaling | | 05 | 05 | 05.02 | 05.02 |
| Málmbrot og sandgrevstur | | 13 | 14 | | |
| **2.5** | **Vøruframleiðsluvinnur** | **15** | **45** | | |
| Ídnaður | | 15 | 37 | | |
| Fiskavirking | | 15 | 15 | 15.20.11 | 15.20.90 |
| tó ikki Fóðurframleiðsla | | | | 15.20.70 | 15.20.70 |
| Orkuframleiðsla | | 40 | 41 | | |
| Byggivinna | | 45 | 45 | | |
| **2.6** | **Tænastuvinnur** | **50** | **95** | | |
| Handil og umvælingarvirksemi | | 50 | 52 | | |
| Gistihús og matstovuvirki | | 55 | 55 | | |
| Flutningur og samskifti | | 60 | 64 | | |
| Føst ogn, útleigan og handils. tæn. | | 70 | 74 | | |
| Aðrar tænastuvinnur | | 75 | 95 | | |

## 2.7 Keldutilfar

Ársroknskapir hjá einstøku fyritøkunum, bæði ársroknskapir og skattaroknskapir við útgreiningum.

Tilfar úr MVG- og samtíðarskattaskipanunum hjá T&S. Harumframt er virkisskráin hjá Toll & Skatt nýtt til eyðmerking og flokking av fyritøkunum.

## 2.8 Viðgerð

Uppgerðirnar eru grundaðar á úrval av roknskapum og meting av tí írestandi. Írestandi virksemi er uppgjørt frá eini upprokning við støði í lønargjaldingum og umsetningi, har heildin er fingin tilvega úr samtíðarskatta- og MVG-skipanunum hjá TAKS.

Í úrvalinum hevur verið miðja ímóti at fáa skrásett/inntøppa roknskapirnar fyri størstu fyritøkurnar í einstøku vinnugreinini, soleiðis at teirra partur av samlaðu lønargjaldingunum í vinnugreinnini ikki er niðanfyri 70%. Vinnugreinaflokkingin, sum nýtt verður er HG3vinnur.

Ársroknskapir sum ikki fylgja kalendaraárinum, t.v.s forskotnir roknskapir, koma undir tað árið har meginparturin av roknskaparárinum er. Fyri t.d. 2003 eru sostatt roknskapir har roknskaparárið byrjaði eftir 31. juni 2002 og endaðu fyri 1.juli 2004.

Tá talan eru um konsernroknskap er roknskapurin hjá móður- og dótturfelagið lagdur inn, t.v.s at sjálvur konsernroknskapurin verður ikki lagdur inn.

# 3 Tíð

### 3.1 Tíðarskeið

Talan er um árini 1998-2003.

### 3.2 Útgávudagfesting

Tilfarið er almannakunngjørt í viku 47, 2004.

# 4 Góðskumeting

### 4.1 Óvissur

Av tí at 10 til 25 prosent av vinnuhagtølunum í miðal fyri hvørt árið eru upproknaði/mett er vandi fyri ávísum skeivleikum í hagtølunum.

Upprokningin er gjørd við støði í teimum roknskapum sum eru lagdir inn, tað vil siga at hædd ikki er tikin fyri gongdini í rakstrinum hjá fyritøkum, har roknskapurin ikki er lagdur inn. Stórar fyritøkur í einstaku vinnubólkunum eru yvirumboðaðar í innlagda roknskapartilfarinum. Í tann mun raksturin hjá smærru fyritøkunum ikki líkist rakstrinum hjá teim størru í bygnaði, verður talan um skeivleikar.

Sum heild verða uppgerðirnar mettar sum rættvísandi, við tað at dekningurin er so høgur, væntast kunnu tí bert smærri frávik hjá fyritøkum sum ikki eru lagdar inn.

### 4.2 Sambæri

Samanberingar við útgávuna um vinnugreinahagtøl frá 2001, kunnu bert gerast við fyrivarni, orsakað av broyttari flokking av roknskapartilfari og at ein nýggj innleggingarskipan er ment og tikin í nýtslu.

Roknskaparhagtølini verða brúkt til tjóðarroknskapin, við ávísum tillagingum.

Eindirnar eru tí ikki heilt tær somu, sum í lønaruppgerðunum hjá hagstovuni, tí at vinnubólkingin er ein onnur.

# 5 Almannakunngerðing

Hagtølini verða almannakunngjørd á netsíðunum hjá Hagstovuni. Tilfarið finst bert á føroyskum.

Grundtilfarið undir roknskaparhagtølunum er goymt í dátugrunni, og møguleiki er fyri at fáa gjørt serkoyringar, í tann mun tær lúka hagtalsligu anonymiseringsásetingarnar.

Hagstovan tekur fegin ímóti spurningum viðvíkjandi vinnuhagtølunum, hesir kunnu sendast til hagstova@hagstova.fo